VÍF-Neistin 28-25 (16-15):

# So fór VÍF í oddin



*Vit hava havt tað trupult seinastu dystirnar, og tí hevði sigurin ómetaliga stóran týdning fyri okkum, helt Rógvi Nielsen eftir dystin*

## Vendu gongdini

**Rógvi Nielsen helt eftir dystin, at vestmenningar vóru teir, sum høvdu størri tørv á at vinna, og at hetta eisini var høvuðsorsøkin til sigurin**

HONDBÓLTSTOS
*Jákup Mørk*

Tá vit beint eftir dystin fingu orðið á einum av VÍF leikarunum, Rógva Nielsen, spurdu vit hann, ein av fortreytunum fyri sigrinum ikki var, at VÍF dugdi betri at »tackla« týdningin av dystinum.

- Tað kann væl vera, mem eg haldi eisini, at vit vóru meira uppsettir til dystin. Sjálvandi vóru teir eisini uppsettir, men ikki á sama hátt.

- Spælið hjá okkum hevur gingið sera striltið seinastu dystirnar, og tó at vit hava vunnið, so hevur tað ikki verið sannførandi. Vit vita væl, hvat vit eru førir fyri, men seinstu fýra til fimm dystirnar hava vit ikki sýnt hetta.

- Skal rætt vera rætt, so hevur hetta tyngt okkum seinastu vikurnar, og ein slík ringrás er altíð trupul at koma burturúr. Júst tí hevði hesin dysturin ómetaliga stóran týdning fyri okkum, og vónandi fer sigurin at lyfta liðið til komandi uppgávurnar, segði Rógvi Nielsen at enda.

**Í einum røttum mannfólkadysti var VÍF stinnari parturin, tá bæði oddaliðini í manshondbólti leiktu avgerandi dystin í grundspælinum**



*Hóast Heini og hinir neistameninnir góvu alt tað teir høvdu í einum røttum mannfólkadysti, so megnaðu teir ikki at halda Daniel Rápa & Co, sum við sigrinum gjørdust vinnarar av grundspælinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

HONDBÓLTUR – MENN
*Jákup Mørk*

Tað var kanska ikki dysturin, sum skuldi avgera meistaraheitið, men í øllum førum var tað ársins dystur higartil, tá VÍF og Neistin hittust í Vestmanna mikukvøldið.

Í ár hava júst hesi bæði verið í serflokki bestu liðini í landinum. Fyrri dysturin millum liðni endaði við javnleiki, og tá grundspælið fram til hendan dystin hevði givið báðum sama málmun, fekk talan valla verið um javnari útgangsstøði.

### Tungur týdningur

Fyrstu løtuna var eisini líkt til, at týdningurin av dystinum tóktist at nerva bæði liðini. Hóast hvørgin parturin var serliga sannførandi í verjuni, so tóktist tað heldur ikki soleiðis, at álopsspælið fekst í rættlag. Tvørtur ímóti var fyrsta løtan fjáltursstungin. Tolsemi var eitt ókent fyribrigdi, og heldur enn at lata bóltin koyra í álopspartinum, varð skotið í úrtíð og aloftast við tí úrsliti, at hvørgin málverjin hevði stórvegis trupulleikar av skotunum.

Nakað inni í dystinum fingu teir á heimaliðnum tó betri tamarhald á sær sjálvum, og har við eisini Neistanum. Samlaða liðavrikið var betri enn tað hjá Neistanum, sum í eina løtu bert hevði skotini frá Heina Joensen og John Petersen at dúva uppá, men tá hesir ikki einsamallir kundu fylgja við vestmenningum, tók spakuliga at dragna.

Dia Midjord á neistabeinkinum royndi við einum time-out at fáa betri skil á, men heldur ikki hetta hjálpti. Álopsmaskinan hjá VÍF við Áka Olsen sum høvuðsmotori koyrdi við fullari ferð, og hesa løtuna vóru gestirnir í veruligum vanda fyri at verða bumbaðir niður, longu áðrenn hálvleikssteðgin.

### Løgið time-out

At Neistin so kortini slapp upp í part aftur fyri steðgin, skulu teir sjálvandi fyrst og fremst takka sær sjálvum fyri, men harafturat fingu teir eina heldur óvæntaða hjálpandi hond.

Meðan alt soleiðis gekk upp á stás hjá vestmenningum, valdi Páll Pouslen á beinkinum brádliga at taka eitt time-out. Tað var ilt at síggja, at tørvur var á nøkrum broytingum, og seinastu minuttirnir undan steðginum sýndu eisini, at um tann broytingin, sum steðgurin bar í sær, eina mest var til fyrimuns fyri Neistan.

Støðan var 14-10 til heimaliðið, tá alt steðgaði í ein minutt, og tó at VÍF beint eftir hetta vann seg upp á 15-10, so megnaðu teir bláu í fyra minuttir at minka um munin, soleiðis at tað bert var 16-15, tá farið var til hálvleiks.

### Neistin og yvirtalið

Kom steðgurin stutt fyri hálvleik illa við hjá vestmenningunum, so var støðan ein heilt onnur, tá tosað verður um sjálvan hálvleikssteðgin.

Kanska í reinari irritatión um mistu leiðsluna í fyrra hálvleiki løgdu vestmenningar frá landi við buldur og brak, nú farast skuldi undir seinna umfari. Fýra mál á rað vórðu fingin til høldar, áðrenn Neistin megnaði at svara aftur, og tó at VÍF nú eina løtu noyddust at spæla við tveimum monnum í undirtali, so hoyrdust á dunandi og eyðkendu VÍF-rópunum, at nú ivaðust tey ikki í, at heimasigurin skuldi vera heima.

Júst hetta við at spæla í undirtali var annars nakað, sum vestmenningar sluppu at royna ofta seinna umfarið. Ikki tí at talan nakran tíð gjørdist um ein ráan ella ljótan dyst, men spælið var hart og kontant. Ein røttur mannfólkadystur.

Hetta kostaði fleiri útvísingar. Serstakliga til vestmenningar. Men tað var merksivert, hvussu illa teir bláu dugdu at gera sær dælt av hesum. Sjáldan ella ongan tíð var í hesum førum roynt at pressa verjuna tunna, og tað einu ferðina var enntá um reppið, at dømt varð fyri nøl, tí Neistin ikki fann sær veg inn um undirmannaðu VÍF verjuna. Nakað sum kanska eisni hekk saman við, at Kári Mortensen á høgra veingi var óvanliga tamur og tí ikki skapti ta breidd, sum hann vanliga ger, eins og Áki Mørk hevði ein sera friðarligan dag, har hann als ikki fekk somu ferð á uppspælið, sum hann vanliga ger. Og so hjálpti tað heldur ikki, at Heini Joensen, sum fyrstu løtuna av dystinum var størsta hóttanin hjá gestunum, nú hevði betri hug at róta, heldur enn at spæla.

### Hin kaldari vann

Hóast hesar eyðsýndu trupulleikar hjá Neistanum, so merkti títta yvirtalið um ikki annað, at teir í stóran mun fingu hildið mótstøðuni frá opnum møguleikum.

Eftir at hava skotið fýra mál fyrstu fimm minuttirnar eftir steðgin, fekk VÍF soleiðis bert tyrý mnál næsta góða korterið, og trygt men spakuliga togaði Neistin seg alsamt nærri.

Fyri fyrstu ferð alt kvøldið hoyrdist brádliga, at hópur av neistafólkum vóru í høllini, og tá tað brádliga stóð á jøvnum 23-23, var spenningurin aftur í hæddini.

Líkt var tó til, at stóra takið hevði kostað Neistanum ov nógv. Vestmenningar tóku aftur at draga, og tá teir takkað verið stórum mistøkum hjá Neistanum brádliga vunnu eina undirtals-støðu, var mest sum liðugt. Vestmenningar dugdu snøgt sagt betri at halda høvdið kalt hesa avgerandi løtuna, og bara tað í sær sjálvum er ein dygd, sum kann verða avgerandi.

Neistin megnaði at gera eitt hálvt spják móti dystarenda, men meira enn hálvt gjørdist tað ongantíð.

VÍF vann dystin og harvið grundspælið, og tó at stigini at spæla um enn eru nógv í tali, so kann væl vera, at júst hetta eina stigið verður hitt avgerandi, tá talt verður saman 23. mars.

### Dysturin í tølum

**VÍF-Neistin 28-25 (16-15):**

Málskjúttar

VÍF: Áki Olsen 9(2), Rógvi Nielsen 5, Agnar Joensen 4, Piti Negru 4, Daniel Rápa 3, Ingi Olsen 2, Ragnar Zachariasen 1

Neistin: Heini Joensen 11(4), Jacob Jónsson 6, John Petersen 4, Hans Áki Dal-Christianse 2, Kári Mortensen 1, Áki Mørk 1

Brotskøst: VÍF 3, Neistin 4

Útvísingar: VÍF 8, Neistin 4

Diskvalifikatión: VÍF 1 (3X2 minuttir)

Dómarar úr Tjaldri: Kári Hansen & Trúgvi Mortensen. Løgdu alt fyri eitt greiða linju, og hildu alla tíðina fast um hesa. Eiga eisini rós fyri at stýra dystinum, heldur enn at døma hann sundur. Ikki minst tí talan var um ein somikið harðan dyst, og so skulu teir ikki taka sær ilt av onkrari býttari viðmerking, sum fall av VÍF beinkinum eftir dystin.



## Skúlin við Ósánna

Í sambandi við at eitt av starvsfólkum okkara fer í annað starv 1. febr. 2002, verður søkt eftir lærara frá 1. febr. 2002 og skúlaárið út.

Starvið, ið er tíðaravmarkað, verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4.
Starvið er stuðul til næming við serligum tørvi.

Umsóknir til starvið skulu vera Stýrinum við Ósáskúlan í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 25. jan. 2002.

**Skúlastýrið fyri Ósáskúlan**
v/ Óluvu Klettskarð
700 Klaksvík

## Útbjóðing

Runavíkar býráð bjóðar hervið út at gera uml. 470 m av vegi lidnan til nýggju atløgusíðuna á Høgabóli, saltangará.

Arbeiðið fevnir um planering, kloakkir, kantsteinar, tvørrennur, gongubreytir, gøtuljós og skráar v.m.

Útbjóðingartilfarið fæst frá týsdegnum 15. jan. við at gjalda kr. 2.000,00 í veð á konto 112 036 2 í Føroya Banka í seinasta lagi 14. jan. 2002 og venda sær til Runavíkar býráð við váttan um at peningurin er goldin.

**Licitatiónin verður fríggjadagin 8. feb. 2002 kl. 14.00 á Býráðsskrivstovuni.**
Boðini verða tá latin upp og kunnu teir bjóðandi vera hjástaddir.

**Býráðið skilar sær rætt til at velja millum innkomnu boðini ella havna øllum.**

Runavíkar Kommuna.

**Runavíkar býráð**
Heiðavegur
600 Saltangará

Úrvalsbilar Spf.

Kom og ger kvetti!

Vit lata stóran avsláttur av bilum í januar, um tit keypa bil frá okkum uttan annan í býti

Kom og fá ein óbindandi royndartúr

Bakkavegur
530 Fuglafjørður
tel. 444943 -& 217704

## Deildarleiðarastarv á Menningarstovuni

Til tess at styrkja virksemið og ráðgevingina í útflutningsviðurskiftum á Menningarstovuni (Faroe Islands Trade Council) verður deildarleiðarastarv við hesum lýst leyst at seta 1. februar 2002 ella skjótast gjørligt.

Stovan arbeiðir við at umskipa sítt virksemi innan útflutningsøkið burtur frá higartil kendu framsýningarluttøku til uppsøkjandi tørvs- og marknaðarkanningar, upplýsing um marknaðarmøguleikar og føroyska vinnu, skeiðsvirksemi og kunningarferðir v.m.

Hon/hann, ið sett/ur verður, skal taka sær av hesari umskipan og fremja hana í verki.

**Førleikakrøv:**
Vit hugsa okkum, at hon/hann, ið sett/ur verður, hevur ástøðiligan, akademiskan førleika í altjóða handli ella líka útflutningskenda útbúgving, vinnuligar royndir og hevur í verki sýnt kreativ avrik á hesum øki.
Tað er ein fyrimunur, at tann setti hevur innlit og kunnleika um traditionella føroyska vinnu, men við vinnupolitiska setninginum um nýggjar vinnur verður størri dentur lagdur á førleika/kunnleika til altjóða marknaðin av hesum vinnum.

**Setanarviðurskifti:**
Lønar- og setanarviðurskifti verða sbrt. avtalu millum avvarðandi fakfelag og Fíggjarmálastýrið ella avtalu, ið kann góðkennast av Fíggjarmálastýrinum.

Umsóknir um starvið verða at senda Menningarstovuni, att.: Kjartan Kristiansen, stjóra, í seinasta lagi 27. januar 2002. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Kjartan Kristiansen.

**Menningarstovan**
Faroe Islands Trade Council
Bryggjubakki 12
Postrúm 259
FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 31 30 28
Fax +298 31 04 59
e-mail: kjkr@trade.fo

Lóg og reglugerð fyri Menningarstovuna áseta, at Menningarstovan skal stuðla menningini av føroyskum ídnaði, handverki og tænastuvirksemi við ráðgeving innan tøkni, búskap, leiðslu og útflutning og fyriskipan og luttøku í vinnufremjandi átøkum innan nevndu øki. Við at byggja brýr millum politiska viljan og vinnuna um vinnumenning eigur virksemið serliga at vera málrættað ímóti
– átøkum, sum menna útflutningsførleikan hjá føroyskum fyritøkum
– skipaðari menning av ávísum vinnugreinum og nýggjum vinnugreinum
– at seta ávís menningarøki í brennidepilin
– menning av vinnuligum undirstøðukervi

**Fiskimálastýrið**
*Fiskivinnustovan*

## Fulltrúi

Starv sum fulltrúi á Fiskivinnustovuni verður hervið lýst leyst til setan skjótast gjørligt.

Fiskivinnustovan er skipað sum deild í Fiskimálastýrinum.

**Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:**
- hava um hendi umsitingina av fiskiídnaðarmálum
- hava um hendi umsitingina av fiskivinnuroyndum
- samskipa leiklutin hjá Fiskimálastýrinum í verkætlanum innan fiskivinnugransking
- samstarv við leiðslu og aðrar fulltrúar í Fiskimálastýrinum um tvørgangandi uppgávur innan fiskivinnumál

**Førleikakrøv:**
- viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni
- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- vera til reiðar til at royna nýggjar avbjóðingar
- kunna virka til lítar og á ein tryggan hátt í einum umhvørvi, har mál til tíðir hava nógvan skund
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni

Grundleggjandi royndir innan virkisøkini er ein fyrimunur

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálastýrið og stovnar/deildir undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Fiskivinnustovan.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í virkisøkinum og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálastýrinum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Fiskivinnustovuni í hendi í seinasta lagi 28. januar 2002 kl. 15.30.

Umsóknir skulu sendast til:

**Fiskimálastýrið,**
**att.: Fiskivinnustovan,**
**Postsmoga 347,**
**110 Tórshavn**

Fyrispurningar starvinum viðvíkjandi kunnu setast Andras Kristiansen, deildarstjóra á telefon 35 30 30.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!

ÍBýin
- hvønn hósdag